# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Blokkin í grunn?

Gongur sum ætlað hjá minnilutalandsstýrinum, so verða umleið 114 milliónir skornar av árligu heildarveitingini frá danska statskassanum. Blokkurin skal sostatt skjerast og hetta verður gjørt sum ein liður í tí sjálvsstýristilgongd, sum landsstýrið hevur byrjað, og sum nú verður fram við parlamentariskum stuðli frá Sjálvstýrisflokkinum. Blokkurin er skaðiligr fyri búskapin og ein forðing fyri øktum sjálvstýri, verður sagt. Tað skuldi verið óneyðugt at nevnt, at full politisk semja er ikki á tingi um hesa tulking. Hinvegin er nú parlamentariskur meiriluti fyri blokkniðurskurðinum og meirilutin ræður í einumhvørjum fólkaræði, og sostatt mugu tey, sum helst síggja blokkin óbroyttan boyggja seg fyri hesum politiska veruleika.

So av og á tá blokkniðurskurður hevur verið framdur, so hevur tikið seg upp eitt orðaskifti um tann pening, sum danski statskassin sparir við, at blokkurin verður minkaður. Tað verður mangan og tað við góðum grundum spurt, um tað er rætt og rættvíst, at hesin peningur, sum føroyingar eiga, fer i danska statskassan. Hví ikki síggja til, at hesin peningur fer til eitthvørt gott føroyskt ella danskt-føroyskt endamál? Undir øðrum heimsbardaga fingu føroysk lesandi í Danmark serstøk lestrarlán, so tey kundu hóra undan krígsárunum. So vítt vitað, komu hesi lestrarlán føroyskum lesandi sera væl við. Tað lánini skuldu rindast aftur eftir krígslok, varð politiskt gjørt av, at hesi lán skuldu fara í ein nýggjan danskt-føroyskan mentanargrunn, ið nógv føroysk menta- og listafólk hava notið gott av. Okkurt graml hevur verið um, at ein partur av tí peningi, sum danir spara við kirkjuyvirtøkuni, skal leggjast í nevnda grunn. Um so er, er hetta bert gott, men her kann neyvan vera talan um stórar og munagóðar upphæddir.

Minnilutasamgongan og stuðulsflokkur hennara átti at tikið hetta hugskot upp til poltiska viðgerð og funnið ein leist at leggja fyri donsku stjórnina. Fyri donsku stjórnina, sum hevur ein sera góðan almennan búskap, gera 114 milliónir kr. ikki tann stóra munin. Men fyri føroyska mentan og list, kundi avkastið av hesi upphædd gjørt góðan mun. Tann peningur, ið danski statskassin sparir eigur, tí at verða lagdur í tann danskt-føroyska mentanargrunni, sum so samstundis eigur at verða umskipaður, so hann verður meira tíðarhóskandi. Tað ber eisini til at stovna nýggjan grunn, ud onkrum ikki dámar tann danskt-føroyska grunnin. Tað hevur verið rikið uppundir, at sparid blokkpeningurin eigur at fara til føroyska gransking. Hetta er eitt dámligt hugskot, men eftirsum alt bendir á, at føroysk gansking, sum er á altjóða støði ikki hevur trupulleikar at finna altjóða fígging, er ein slík loysn kanska ikki so átrokandi. Hinvegin tykist tað gerast alt meira truplult hjá mentanar- og listafólki at fáa fígging m.a. orsakað av trótandi politiskari vælvild. Tað eru sostatt góðar grundir til at umhugsa, hvussu spardi blokkpeningurin, sum vit jú eiga, best verður gagnnýttur.

**Sosialurin**

## Føroyar sjálvsagt eisini partur av einum galnum heimi

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
keldu@post.olivant.fo



**Nakrir fáir spjæddir tankar um veruleikar, metingar og meiningar og hvat hevur tíðindavirði**

Kenda, gløgga og nógv roynda listarkvinnan, sum eisini er høvundur, Joni Aerecksson Tada, gav út bók, sum fekk heitið í danskari umseting "Et stille sted i en gal verden", her hugsar hon sjálvandi um bønarløtuna.

Nú eitt kvøldið bar smílandi danski tíðindamaðurin í DR 1, Kim Bildsøe, boðini um tvinnar ræðuligar vanlukkur í USA. Onnur var um ódnirnar Gustav, Honnu og Aik, sum fóru at gera nógv um seg, og hin um, at nú var Bristol, 17 ára gamla dóttir republikanska varaforsetavalevnið Sarah Palin við barn. Mamman var jú ímóti fríari fosturtøku, ímóti upplýsing um sexlívi o.s.fr. – o.s.fr.

Vitandi at vinstrivongurin hevur vart og av øllum alvi verjir fría fosturtøku, heldur seg vera einsmallan um at hugsa, at "kvinnan eigur egið likam", so er tað ein ræðulig vanlukka, at republikanska gentan Bristol, nú er við barn ógift. Og at hetta á hent á høgravonginum í Amerika, ja, í USA.

**Lættast at geva eftir**

Tað hevði sterkt árin á meg nú eitt kvøldi eg hugdi at DR 1, har samrøða var við danskt par. Tey væntaðu sær barn, men høvdu screenað seg fram til, at fostrið hevði ein ov stuttan undirarm. Ikki bar til at fáa fosturtøku í Danmark, tí fostrið var 22 vikur, og soleiðis lívført. Fóru tí til Bretlands, har hon fekk fosturtøku.

Í oddgrein í sosialinum, har høvundurin skrivar um "kalda kríggið umaftur" sigur hann m.a. at: "Undir Clinton stjórnini eydnaðist hetta væl, (at halda friðarliga javnvág), tí USA og NATO dugdu sær hógv og ansaðu eftir ikki at eyðmýkja Rusland...". Eitt Rusland, sum júst hevur brotið seg inn á Georgia.

John Aschcroft, fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin, sum hevði útlendingamál um hendur, sigur í bók síni "Never again", at tá teir tóku ungan mann áðrenn 9/11, og eftir avhoyringar fingu prógv fyri, at hesin skuldi vera 20. flogrænarin, men varð innsettur, gjørdu fjølmiðlarnir gjøldur burtur úr løgmálaráðharranum, áðrenn veruleikin kom fram, at "taka ein ungan fittan hampamann og gera hann til brotsmann". Annars sigur Aschcroft eisini, at fram er komið síðani, at av teimum 19 flogrænarunum vóru 5 ólógliga í landinum, tí uppihaldsloyvið var útgingið.

Vinstrivongurin hevur altíð givið eftir. Tað gjørdi hann eisini í 1938, tá Wintston Churchill fór til demokratin Roosewelt og brotsmannin Stalin og segði teimum: "Taka vit ikki Adolf Hitler nú, henda mannin sum er rablandi svakur, endar hetta við einum ræðuleika".

Hesir báðir bert flentu háandi at Churchill. – Úrlitið og søguna kenna vit!

**Tørvandi gransking**

Vinstrivongurin hevur eisini mótmælt at amerikumenn fóru inn í Irak, eftir at komið var fram m.a., at Saddam Hussein helst gjørdi av við 250.000 óskyldug børn.

Vit hava ongantíð sæð ta gransking, hvat hevði hent, um sammeindu Bretland, Danmark og USA ikki gjørdu álvara av at fara inn. Sjálvandi hava vit sæð nógvar syrgiligar lagnur. Spurningurin er bara, hvat hevði hent, um hesir sameindu bara lótu standa til.

Spennandi verður hjá teimum, sum í dag eru ung, at fara lesa søguna.

Hetta er ein pinkulítil brotpartur og sera spjæddir tankar, sum eigur at minna okkum á, at Føroyar eisini eru partur av einum galnum heimi.

## Blokkurin

**HEÐIN D. POULSEN**



Landsstýrið hevur ætlanir um at skerja blokkin. Til síðsta val vóru tað nógvir flokkar, ið tosaðu um sjálvberandi búskap. Men, sum við so mongum vøkrum orðum, so er tað so ymiskt hvat flokkar og persónar leggja í orðini.

At Sambandsflokkurin ikki tekur undir við einum niðurskurði í blokkinum kann ikki koma óvart á nakran. Ráddi Sambandsflokkurin, so høvdu vit bert livað av olmussu úr Danmark. Men, tað sum man undra mong er, at nú eru tveir Sambandsflokkar á tingi, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin. Hetta er ein politisk vend síðani samgongusamráðingarnar millum ABC, har tað kom fram, at ein av mongu ósemjunum var, at ein partur av Fólkaflokkinum kravdi niðurskurð av blokkinum. (Dimmalætting 25. januar 2008)

Nú hevur so formaðurin í Fólkaflokkinum vegna flokk og tingmanning meldað greitt út, at vallyftini ikki halda longur, og at Fólkaflokkurin ikki tekur undir við niðurskurði av blokkinum.

**Fíggjarætlan**

At skerja blokkin, uttan eina greiða ætlan, hvussu tilsvarandi upphædd skal koma í landskassan, er í hesum døgum - í besta føri, vánalig planlegging.

Sjálvstýrisflokkurin lovaði eisini sjálvberandi búskap til síðsta val, men skil skal vera í. Tann dagin ein skilagóð fíggjarætlan og vakstrarætlan fyri búskapin fyriliggur, um hvar inntøkurnar, ið vit missa við einum møguligum niðurskurði skulu koma frá, eigur flokkurin at taka undir við niðurskurði av blokkinum.

Tað eigur tó, at vera heilt greitt, at avgjøld ella skattir skulu ikki hækka, fyri at fíggja ein niðurskurð í blokkinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.